Royndin hjá Karsten Hansen miseydna›ist

N‡ggja vaktarskipi› Brimil fer meiri og meiri at líkjast einum jólatrølli, tí enn er ongin loysn á trætuni um lønina hjá yvirmonnunum, sum skulu sigla. T‡sdagin var› enn ein roynd gjørd at fáa semju. Men hon er longu miseydna›, tí uppskoti› frá Karsten Hansen um lønina hjá yvirmonnunum er sópa› av bor›inum

–Uppskoti›, sum hann t‡sdagin leg›i fyri manningarfeløgini um lønina hjá teimum, sum skulu sigla vi› Brimli, ver›ur ikki gó›tiki›

LØNARTRÆTA
Áki Bertholdsen

Ta› er framvegis ongin loysn í eygsjón í trætuni um lønina hjá teimum, sum skulu manna n‡ggja vaktarskipi›, Brimil.

T‡sdagin var› annars ein roynd gjørd afturat at fáa semju ímillum Fíggjarmálast‡ri› ø›rumegin og tey bæ›i yvirmannafeløgini, Skipara- og Navigatørfelagi› og Maskinmeistarafelagi› hinumegin, um ein n‡ggjan sáttmála fyri yvirmenninar á Brimli.

Tann royndin enda›i vi›, at Fíggjarmálast‡ri› leg›i eitt uppskot fyri partarnar, sum teir sí›ani skuldi sova uppá.

Sambært tí›indunum í útvarpinum t‡skvøldi›, skuldi fundur aftur ver›a ímillum partarnar í dag, har Fíggjarmálast‡ri› vænta›i at fáa svar frá manningarfeløgunum, antin tey gó›tóku uppskoti›, ella ikki.

Men hvørki Ellintur Abrahamsen, forma›ur í Skipara- og Navigatørfelagnum, ella Finnleif Guttesen, forma›ur í Maskinmeistarafelagnum, kenna naka› sum helst til, at fundur skal vera í dag.

– Ta› er ongin avtala um fund í dag, siga teir bá›ir.

Og ta› er eisini longu nú greitt, at eisini hendan seinasta royndin hjá Karsten Hansen, landsst‡rismanni í fíggjarmálum, at fáa semju um Brimil, er miseydna›.

– Vit gó›taka ikki uppskoti› og tær fær Fíggjarmálast‡ri› formlig bo› um sigur Ellintur Abrahamsen. Forma›urin í Maskinmeistarafelagnum vildi ikki siga naka› um máli› í gjáramorgunin, tí hann vildi fyrst kunna hinar nevndarlimirnar í Maskinmeistarafelagnum.

Men ta› skiltist á honum, at ta› eru lítlar vónir fyri, at Maskinmeistarafelagi› gó›tók hetta seinasta uppskoti› frá Fíggjarmálast‡rinum.

– Hugurin til at gó›taka uppskoti› er onki serligur, sigur Finnleif Guttesen.

Hann sigur, at Maskinmeistarafelagi› sær onki endamál í at ver›a raktir av verkbanni› og so at gó›taka eina semju, sum gevur nakrar hundra› krónur meiri um mána›in.

Hann sigur tó, at ta› seinasta uppskoti› hjá Fíggjarmálast‡rinum er væl frægari enn nakrar hundra› krónur um mána›in.

– Ta› er eisini frægari enn tey fyrstu tilbo›ini vóru. Men kortini eru tey ov langt frá okkara krøvum, leggur hann afturat.

Men naka› krónutal, ella naka› prosent, vil hann ikki nevna.

Finnleif Guttesen sigur kortini, at einafer› skal ein loysn finnast. Men nær ta› ver›ur, er ein heilt onnur søga.

Ellintur Abrahamsen sigur, at Fíggjarmálast‡ri› hevur bjó›a› eina lønarhækking uppá runt rokna› 19,5%.

Men av teimum skulu 15 % leggjast í eina eftirlønarskipan, so at bara 4,5% eru verulig lønarhækking.

– Og ta› er ongin ivi um, at hetta uppskoti› ver›ur blankt afturvíst.

Men samstundis er skj‡tur Fíggjarmálastyri› upp, at vit skulu gerast tænastumenn. Tvs, at ætlanin er at taka verrkfalsrættin frá okkum, tí tænastumenn kunnu ikki fara í verkfall, og ta› kunnu vit heldur ikki gó›taka.

Ellintur Abrahamsen sigur, at uppskoti› frá Fíggjarmálast‡rinum er so torskilt, at ta› er ikki búgvi› at taka srø›u til.

– Vit hava tí sagt, at vit kunnu taka ta› heim vi› at kanna nærri fyri at vita, um okkurt var í tí, sum vit ikki høvdu varnast í fyrstu syftu.

– Men ta› er framvegis ongin ivi um, at ta› ver›ur afturvíst.

Ellintur Abrahamsen sigur, at uppskoti› frá Fíggjarmálast‡rinum var frægari hesufer›, enn tey hava veri›.

– Men ta› gongur verri enn so okkara krøvum á møti.

Forma›urin í Navigatørfelagnum sigur, at hann dugir ikki at síggja, hví yvirmenninir á Brimli skulu hava verri løn enn teir, sum sigla vi› donsku verjuskipunum undir Føroyum.

– Tí hava vit kravt eina endaløn til skiparan uppá gó› 35.000 krónur, tá i› eftirlønin er uppi í, og ta› er álei› ta› sama, sum skiparin á danska verjuskipinum undir Føroyum, fær.

Í løtuni er endalønin ikki meiri enn gó›ar 23.000 krónur.

Hann vísir eisini á, lønin hjá yvirmonnunum er heilt afturútsigld hesi seinastu árini.

Í 1977 var skiparalønin hjá teimum, sum sigla vi› Vaktar & Bjargingartænastuni 50% hægri enn dekkaralønin. Nú er hon bara 23% hægri.

Hava gjørt semju um borgarstjóran á Tvøroyri

Ta› ver›ur Finnleif Guttesen úr sambandsflokkinum, sum ver›ur n‡ggjur borgarstjóri á Tvøroyri

B†RÁ‹SSAMGONGA
Áki Bertholdsen

Ta› er nú greitt, at ta› ver›ur Finnleif Guttesen, sum ver›ur borgarstjóri á Tvøroyri í næsta valskei›i.

Ta› eru teir tríggir flokkarnir, sum mynda b‡rá›ssamgonguna á Tvøroyri, nú blivnir samdir um.

Sostatt hevur n›ggja b‡rá›ssamgongan tiki› bo›ini frá kommunuala eftirlitinum hjá Landsst›rinum til eftirtektar.

Ta› eru teir tríggir b‡rá›slimirnir fyri javna›arflokkin, sum skipa n‡ggju b‡rá›ssamgonuna á Tvøroyri, saman vi› Finnleif Guttesen úr Sambandsflokkinum og Kristin Michelsen úr uttanflokkalistanum.

Í andstø›u sita Bergur Bærendsen og Dan Nielsen, sum nú er borgarstjóri, teir bá›ir eru valdir á samgongulistanum.

Annars var ta› ætlanin, at ta› skuldu ver›a tveir b›‡rá›sformenn á Tvøroyri ta› næsta valskei›i›.

Eftir drúgvar samgongusamrá›ingar, samdist partarnir um, at Finnleif Guttesen skuldi vera borgarstjóri tey bæ›u fyrru árini í valskei›num, men at Kristin Michelsen tá skuldi taka yvir tey bæ›i seinnu árini.

Men tá i› hendan avtalan kom fram, gjørdi kommunala eftirliti› vart vi›, at ta› bar ikki til at gera slíkar avtalur, tí ta› stendur í Kommunulógini, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir fyri alt valskei›i› og at ta› ikki ber til at skifta borgarstjóra í valskei›num Lógfrø›ingar, sum b‡rá›ssamgongan hjá b›rá›num hevur spurt, eru komnir til somu ni›urstø›u.

Ta› vóru tey, sum stúrdu fyri, at hetta fór at spilla alt spæli› hjá n‡ggju b‡rá›ssamgonguni á Tvøroyri, tí ta› skiltist, at ta› stór› nógv á, at fáa semju yvirhøvur.

Men ta› gekk kortini sum smurt at semjast av n‡ggjum.

Bæ›i Sverri Midjord, sum er fyrst valdur b‡rá›slimur á Tvøroyri og Finnleif Guttesne, sum ver›ur borgarstjóri, vátta, at samgongan hevur gjørt n‡ggja avtalu.

Og eftir henni, ver›ur Finnleif Guttesen borgarstjóri á Tvøroyri.

Aftir ætlan, skuldi b‡rá›i› á Tvøroyri skipa seg í gjárkvøldi›, ella í dag.

Finnleif Guttesen ver›ur n›ggjur borgarstjóri á Tvøroyri . Ta› er b‡rá›ssamgongan nú samd um, eftir at bo› komu úr Landsst‡rinum um, at ta› ikki bar til at hava tveir borgarstjórar í einum valskei›i, sum upprunaliga ætlanin annars var á Tvøroyri

Forma›ur Lærarafelagsins:

– Vit hava fingi› dygga álitisváttan

- Vit í nevndini hava fingi› eina dygga álitisváttan, metir Elsa Birgitta Petersen, forma›ur í Lærarafelagnum

Á eykaa›alfundi um vikuskifti› var› broytingaruppskot hjá nevndini í Lærarafelagnum í sambandi vi› samlagstryggingina samtykt. Uppskoti› hjá yngru lærarunum fall, men teir hava ikki ætlanir um at lata hetta fara afturvi› bor›inum

SAMLAGSTRYGGINGIN
Stefan í Skorini

Vi› grei›um meiriluta var› samtykt, at ískoytiseftirlønin ikki skal avtakast.

Broytingaruppskoti› hjá nevnd felagsins var, at teir limir, sum eru yngri enn 35 ár, bara skulu gjalda helvtina av samla›a ingjaldinum um mána›in.

Broytingin hevur vi› sær, at munurin millum samla›a inngjaldi› hjá teimum yngru og teimum eldru minkar.

Yngru lærararnir skutu upp, at avtaka ískoytiseftirlønina heilt, men uppskoti› fall.

Álitisváttan

Á a›alfundinum 17. juli í ár var› ta› einmælt samtykt at dagføra og broyta samlagstryggingina, men sí›an ta› hava fleiri lærarar víst sína ónøgd vi› hesa skipan. Teir vilja eisini vera vi›, at kunningin ikki var nóg gó› á hesum fundi.

Yngru lærararnir vístu á, at teir skulu gjalda nógv meira enn teir eldru, men fáa hóast ta› eins útgjald, sum er 100.000 krónur, tá teir røkka til eftirlønaraldri.

Hesin mismunur førdi til, at undirskriftir vór›u savna›ar og kalla› var› inn til eykaa›alfund, har yngru lærararnir mæltu til, at ískoytiseftirlønin var› avtikin. Hetta vann tó ikki frama.

– Vit føla, at vit í nevndini hava fingi› eina dygga álitisváttan á eykaa›alfundinum. Hitt uppskoti› fall vi› eitt brak, og vit eru komin styrkt burturúr hesum her, sigur Elsa Birgitta Petersen, forma›ur í Lærarafelagnum.

– Ta› gle›ir meg, at meirilutin av limunum í felagnum seta solidaritetin í hásæti í røttum fakfelagsanda, sigur Elsa Birgitta Petersen.

– Vi› broytingaruppskotinum vildu vit rætta hondina fram móti teimum yngru limunum, tí vit vilja gjarna hava, at teir vera verandi í samlagstryggingini og í felagnum. Vit royndu at finna eina semju, sigur Elsa Birgitta.

Elsa Birgitta Petersen sigur eisini, at eitt av málum felagsins er, at liviumstø›urnar skulu ikki versna munandi, hóast limir felagsins fara frá vi› eftirløn. Vi› hesi skipanini eru tey í felagnum komin nærri málinum, metir hon.

Fer ikki afturvi› bor›inum

Magnus Tausen var ein av teimum yngru lærarunum, sum hevur veri› sera ónøgdur vi› verandi ískoytiseftirløn í samlagstryggingini. Hann vísti á eykaa›alfundinum á, at "ískoytiseftirlønin gongur í okkara føri ímóti øllum teimum grundsjónarmi›um, tryggingin byggir á".

Hann seg›i eisini í rø›u sínari, at ta›, sum yngru lærararnir gjalda inn, als ikki stendur mát vi› ta›, teir fáa útaftur vi› 67 ára aldur. Me›an eldru lærararnir rættiliga gera kubbi›.

Bólkurin hjá Magnusi er ikki nøgdur vi› broytingaruppskoti›, hóast nevndin royndi at bøta um stø›una.

– Lutfalli› millum eldri og yngri lærarar er framvegis skeivt. Vit hava enn limir, sum næstan einki hava goldi›, men fáa hóast ta› 100.000 krónur, tá teir gerast 67, me›an vit yngru skulu gjalda í fleiri ár og fáa somu upphædd, sigur Magnus.

Magnus er eitt sindur vónbrotin av, at ikki fleiri av teimum yngru lærarunum møttu upp til fundin. Hann sigur, at "hetta er ein stór last hjá okkum".

– Eg meti, at ta› er kreppa í felagnum, tí ta› er givi›, at ta› er ikki so gott, sum ta› burdi veri›. Tryggingarskipanin hevur b‡tt limirnar í tey yngri og tey eldru, sigur Magnus Tausen.

– Hetta gongur ikki aftur vi› bor›inum. A›alfundur ver›ur aftur um hálvt ár, og eg ivist ikki í, at okkurt ver›ur á skránni aftur tá, leggur Magnus afturat.

Elsa Birgitta Petersen sigur at enda, at allar avger›ir ver›a tiknar á a›alfundunum, og tí er ta› alney›ugt, at limirnir møta upp á teimum fundunum, um teir vilja hava ávirkan.

Shirley Valentine og anna› undirhald á Meiarínum

SJÓNLEIKUR

Í anna›kvøld, hóskvøldi› 7. desember kl 20 skipar Gríma fyri einum kvøldi vi› løttum undirhaldi.

Á skránni ver›ur Adelborg Linklett úr Klaksvíkar Sjónleikarfelag vi› einmansleikinum Roykjarin eftir Rudolf Joensen og Kára Øster.

Kristina Hansen, Hans Tórgar› og Egi Dam framføra brot úr Jólakabarettini 2000, og Laura Joensen spælir brot úr einsmansleikinum, Shirley Vallentine.

Shirley Valentine, sum í 1994 fylti øll sjónleikar- og samkomuhús í laninum – sjálvt á smáu plássunum – hugtók allasta›ni vi› síni opinskára›u søgu um sítt privatlív, og ofta trilla›ur tárini av látri.

Hóskvøldi› ver›ur aftur høvi› at síggja »tær bestu søgurnar hjá Shirley«.

Gríma hevur í november og desember havt fleiri kvøldsetur á Meiarínum, og hava tær veri› sera hugnaligar og væl dámdar. Undirhaldskvøldi› vi› m. a. Shirley Valentine er tann seinasta kvøldsetan hjá Grímu í ár.

Vælkomin á
Ungdómssamfelagsstevnu
í Klaksvík
í døgunum 7.–10. desember í Betesda

Fríggjadagin		***Sunnudagin***	
Frálæra	kl. 20.00	Breyðbróting	kl. 11.00
Opið hús	kl. 22.15	Evangeliskt møti	kl. 17.00
Leygardagin			
Bíbliutími	kl. 15.00		
Bíbliutími	kl. 16.00		
Frálæra	kl. 20.00		
Opið hús	kl. 21.30		

Sangluttøka:
Torkil Mørkøre, Bjarni Jøkladal, og ung úr Betesda

Talarar:
Páll Poulsen, Jákup Eli Østerø, Óli Steinberg, Høgni Jóhannesen, Poul Færø, Justinus Eliassen, Jákup Hansen, Karl Johannesen, Anfinn Norðbúð, John Færø og fleiri

Um innivist ynskist, vinarliga ring 455701

Øll eru hjartaliga vælkomin!

*»Hugsa um skapara tín á **ungdómsdøgunum**, áðrenn hinir óndu dagar koma…« Præd. 12,1*